LM-055/2022

Armgarð Weihe

Fra: "Arnbjørn Ó. Dalsgarð" <arnbjornd@mail.fo>
Sendt: 8. november 2022 11:35
Til: Mentamálaráðið
Emne: Viðmerkingar til uppskot um nýggja bókasavnslóg

Til Uttanríkis- og mentamálaráðið

Eg fegnist sum so mong onnur um, at ein nýggj bókasavnslóg nú verður løgd fyri Løgtingið. Talan er um dagføringar, sum leingi hava verið tiltrongdar, og eisini um nýggjar, spennandi ásetingar, sum heilt vist fara at stuðla undir bókasavnsøkið, verða tær samtyktar. Til dømis ásetingarnar um ljóðbøkur, universitetsbókasavn og bókasavnsráð.
Av tí at eg sjálvur eri skrivari hjá bæði Fjølrit og Rithøvundafelagnum, vil eg fyrst vísa til tær viðmerkingar, sum hesi feløg hava sent tykkum, sum mest snúgva seg um rættindaspurningar hjá limunum í hesum feløgum.
Tá tað snýr seg um bókasavnsfakligar spurningar, fegnist eg stórliga um innihaldið í nýggju lógini, men havi kortini nakrar smærri viðmerkingar.
Í serstøku viðmerkingunum til § 7 verður skrivað, at bókasavnshøli skulu verða innrættað soleiðis, at tey í mestan mun taka atlit til ymsu brúkararnar og teirra tørv. Her haldi eg, at tað hevði verið hóskandi at nevnt, hvørjir hesir bólkar eru, til dømis smábørn, eldri fólk, ung, lesandi, fyri at undirstrika týdningin av hesi viðmerking.
Í § 20 verður í serligu viðmerkingunum skrivað, at bókasavn, ið átekur sær partar av høvuðsbókasavnsuppgávuni, skal hava somu bókasavnsskipan sum Landsbókasavnið. Sjálvur haldi eg, at hetta krav kann verða ov avmarkandi, tí tað ber væl til at hugsa sær, at tað væl letur seg gera at samskifta og samstarva, hóast bókasavnsskipanirnar eru ymiskar. Tað er jú støðan í dag, og við eitt sindur av vilja og vitan ber tað væl til.

Góða eydnu við uppskotinum.

Arnbjørn Ó. Dalsgarð
arnbjornd@mail.fo
+298 224090